## Gáva til Listasavnið

Tá Helga Hjørvar fór frá sum stjóri í Norðurlandahúsinum, var samkoma til æru fyri Helgu og manni hennara Úlfi Hjørvar hildin í Kirkjubø. Við hesa samkomu fingu Føroyar frá Úlfi Hjørvar bæriliga gávu. Úlfur Hjørvar handaði Jógvani á Lakjuni, landsstýrismanni í mentamálum, eina vatnlitsmynd, sum víðagitni íslendski listamálarin Finnur Jónsson hevur málað. Motivið er úr Froðba í Suðuroy og varð málað miðskeiðis í 1920-unum, einaferð Finnur Jónsson var ferðamaður við skipi á veg úr Íslandi til Danmarkar. Úlfur Hjørvar ynskti, at myndin skuldi latast Listasavni Føroya í varðveitslu, og er hesum ynski nú gingið á møti við tað, at landsstýrismaðurin nú hevur handað Listasavninum myndina. Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, sigur, at gávan er eitt dømi um tað vinalag og ta sínamillum virðing, sum eyðkennir viðurskiftini millum Ísland og Føroyar.



## Sjálvsstýrisflokkurin trý valevni í Norðoyggjum

Norðoya Sjálvsstýrisfelag er liðugt við uppstillingina til løgtingsvalið. Sjálvstýrisflokkurin í Norðoyggjum hevði uppstillingarfund seinasta mánakvøld, og har var semja um at stilla trý valevni upp til komandi løgtingsval. Tey trý valevnini eru Eyðun Eltør, fyrrverðandi landstýrismaður, Sven Dahl, plátusmiður og Kristian Eli Zachariasen, býráðslimur í Klaksvík.

## Felags ferðsluætlan

Landsstýrismaðurin í vinnumálum fekk í gjár handað uppskot um eina ferðslutrygdarætlan fyri Føroyar 2008-2015. Landsstýrismaðurin setti á sumri í ár ein bólk at gera eitt uppskot til eina ferðslutrygdarætlan, og er bólkurin nú liðugur við arbeiðið.

Umboð fyri Akstovuna, Føroya Kommunufelag, Føroya Landfúta, Kommunusamskipan Føroya, Landsverk, Ráðið fyri Ferðslutrygd og Vinnumálaráðið hava luttikið í arbeiðinum, og er bólkurin í samdur um uppskotið, sum í dag varð handað landsstýrimanninum.

Landsstýrismaðurin segði í sambandi við at ferðslutrygdarætlanin varð handað:

- Eg eri sera væl nøgdur við, at tað nú fyriliggur eitt uppskot til ítøkiliga ætlan, sum eg vænti kann flyta okkum nærri visiónini um, at eingin skal doyggja ella verða álvarsliga skaddur í ferðsluni. Tað er ein stór avbjóðing at minka um talið á ferðsluvanlukkum samstundis sum ferðslan økist, og eiga vit at taka hesa avbjóðing í størsta álvara, segði Bjarni Djurholm.

Uppskotið til ferðslutrygdarætlan verður nú lagt á heimasíðurnar hjá teimum pørtum, sum hava luttikið í arbeiðinum, so fólk fáa høvi at kunna seg um og ummæla uppskotið.

# Sandoyartunnilin setir skump undir tríggjar oyggjar

**Útoyggjafelagið gevur undirsjóvartunlinum í Sandoy sín fulla stuðul, men sjálvandi skal Hestoy knýtast upp í, tí alt annað verður ein vanlukka**

UNDIRSJÓVARTUNNIL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Verður rætt atborið, verður undirsjóvartunnilin í Sandoy lívæðrin hjá trimum oyggjum.

Tað heldur Útoyggjafelagið, sum gevur sín fulla stuðul til at tunnilin verður gjørdur.

Útoyggjafelagið sigur á síni heimasíðu, at tað er sjálvsagt, at undirsjóvartunnilin eisini verður bundin í Hestoynna.

Felagið sigur, at tey hava fleiri ferðir gjørt vart við kravið um, at Hestoy verður bundin upp í og tey hava eisini savnað inn undirskriftir inn fyri at fáa vekt aftanfyri kravið.

Men Útoyggjafelagið heldur eisini, at ein tunnil í Hestoy og Sandoy, fer eisini at gagna Skúvoy, tí við hesum fær Skúvoy munandi betur samband.

Tá nýggjur bátur kemur at røkja siglingina til Skúvoynna, verður laga manni, at fáa vinnuvirksemi í Skúvoy, so tilsamans fer undirsjóvartunnilin at gera mun fyri tríggjar oyggjar og fyri alt landið sum heild.

- Gott ferðasamband er lívæðrin hjá útoyggjunum, og tá eitt so gott høvi býðst, sum ein undirsjóvartunnil til Sandoynna, er tað einki annað enn ein vanlukka, um hesin ikki verður lagdur umvegis Hest, sigur Útoyggjafelagið.

Felagið staðfestir, at ein tunnil er dýrur og tí er tað heilt sjálvsagt, at Hestur verður ein partur av hesi ætlan, tá nú hetta høvið býðst.

- Tann meirkostnaður, ið verður av at knýta Hestoy upp í, skal samanberast vit tørvin á einari nýggjari ferju, bæði íløgu og rakstri. Samstundis skal eisini leggjast upp fyri, at farleiðin somuleiðis skal lúka framtíðar krøv, bæði til títtleika og komfort, soleiðis sum tað er lýst í samferðsluætlanini.

Men Útoyggjafelagið heldur, at størsti vinningurin, við at knýta Hest upp í tunnilsætlanina verður, at enn ein oyggj verður knýtt at meginøkinum.

- Við hesum hevði Hestoy fingið allar teir menningarmøguleikar, ið ein slík samanbinding ber í sær, og tað er ein stórur vinningur fyri bæði tey sum búgva í Hesti, men ikki minst fyri føroyska samfelagið sum heild, sigur Útoyggjafelagið.




*- Tað er onki minni enn ein vanlukka at útihýsa Hestoy frá ætlaða undirsjóvartunlinum út í Sandoy, sigur Útoyggjafelagið*

# Spurningur um svínoyingar fáa sín vilja

**Svínoyingar hava staðiliga heitt á politisku myndugleikarnar um at gera tunnil út í Havn í Svínoy og Landsverk heldur, at tað er rætt at gera simuleringar**

SAMFERÐSLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Í fleiri ár hevur verið arbeitt við møguleikunum at bøta um ferðasambandið til Svínoyar og tað kann ikki sigast annað, enn at framstigini eru smá.

Men Landsverk og svínoyingar hava verið ósamdir um, hvør loysn skal veljast

Bygdarráðið í Svínoy hevur fleiri ferðir ført fram, at tað einasta rætta er at gera tunnil út í Havn í Svínoy og at gera eina nýggja samferðsluhavn har á staðnum.

Hinvegin hevur Landsverk hildið fast um, at skilabesta staðið at gera nýggja havn í Svínoy er á Eiðinum.

Í fjør vóru botnkanningar streymmátingar- og aldusimuleringar gjørdar í Svínoyarfirði og tær vístu, at tað helst ber til at gera eina havn á Eiðinum í Svínoy, sum verður munandi bíligari enn tað verður at gera eina havn yviri í Havn, tí har krevst eisini, at tunnil verður gjørdur.

Harafturat kemur, at yviri í Havn er harður streymur og óregluligur botnur.

Hinvegin ivast Svínoyingar sjálvir í um tað ber til at fáa eina kyrra havn á Eiðinum og teir mæla framvegis til, at nýggj samferðsluhavn verður gjørd yviri í Havn, tí tað er tað besta staðið.

Landsverk heldur framvegis, at modellroyndir eiga at verða gjørdar, sum skulu vísa, hvussu tað ber til at gera eina havn á Eiðinum.

Men hinvegin heldur Landsverk eisini, at tað er rætt at gera siglingarsimuleringar av báðum møguleikunum, áðrenn endalig støða verður tikin .

Landsverk ætlar tí at fáa 1,2 millión næsta til at gera hesar kanningar fyri, hava vit fingið upplýst í politisku skipanini. So kanska hómast útlit fyri, at ein loysn verður funnin

Men nú hava politikarar so nevnt ein heilt triðja møguleika og tað er at gera undirsjóvartunnil út í Svínoyar og spurningurin er so, hvørja ávirkan tað fer at fáa á støðuna.